# GERÐABÓK

**Dato:** 27. februar 2025 **Kl**. 16:00
**Stað:** Býráðssalurin
**Málsnr: 49/25 – 66/25**

**FUNDARLEIÐARI:**
Elsa Berg

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Heðin Mortensen
Heidi Lava Elgeirsdóttir
Annita á Fríðriksmørk
Anja Weyhe
Kristianna Winther Poulsen
Bergur Robert Dam Jensen
Guttormur í Skála
Annfinn Brekkstein
Tróndur Sigurðsson
Kári Johansen
Høgni Vilhelmsen
Birgir Nielsen

**LUTTÓKU EISINI:**
Eyðna Justinussen
Eyðfríð Jacobsen
Fríður Dalsgarð
Mortan Simonsen
Lars Larsen Black

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Jóan Petur Hentze

**PROTOKOLLFØRARI:**
Anna Havmand/Magnus Dam

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 49/25 | 25/00163-1 | Mál beind í nevndir 2025 | 120 |
| 50/25 | 25/00054-2 | Avrikssáttmáli við Visit Tórshavn 2025 | 122 |
| 51/25 | 25/02736-1 | Oyggjaleikir 2027 - Fígging | 124 |
| 52/25 | 25/02161-1 | Trivnaðarøkið við bátahylin í Álakeri | 126 |
| 53/25 | 25/02723-1 | Stormpullartar á molanum - 24/03385 | 128 |
| 54/25 | 25/02724-2 | Bátahylur í Álakeri - 19/00083 | 130 |
| 55/25 | 25/01926-4 | Útstykking oman fyri Argjahamar – øki 6.1 | 132 |
| 56/25 | 25/02390-2 | Víðkan av kirkjugarðinum í Kollafirði | 136 |
| 57/25 | 25/00581-2 | Útstykking til sethús við Stórutjørn - 22/02943 | 139 |
| 58/25 | 25/02841-1 | Orkuátøk á Lágargarði | 143 |
| 59/25 | 25/00801-1 | Broyting av almennu byggisamtyktini fyri part av matr. nr 13a, Norðradalur - frá 4. grundumráði til F alment frítíðarøki | 146 |
| 60/25 | 25/00818-1 | Fyrispurningur um broyting av byggisamtykt, galdandi fyri matr. nr. 50ø, Velbastaður | 149 |
| 61/25 | 25/00863-1 | Broyting av almennu byggisamtyktini fyri part av matr. nr. 139a, Hoyvík - Vinnuøkið á Ovara Hjalla, | 152 |
| 62/25 | 25/01103-1 | Elbilafelagið: Umsókn um broyting í byggisamtyktum til frama fyri orkuskifti | 154 |
| 63/25 | 25/01104-1 | Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað | 156 |
| 64/25 | 25/00161-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2025 | 159 |
| 65/25 | 25/00436-14 | Umsókn um prinsipielt byggiloyvi til nýggja kirkju á matr. nr. 115, við Støðlagøtu á Argjum - 20/03903 | 161 |
| 66/25 | 25/00285-1 | Broytingar í viðtøkunum fyri SEV - 24/03799 | 162 |

| | **Býráðsfundur**<br>27. februar 2025 | Blað nr.: 120<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

**Til viðgerðar**

# 49/25 Mál beind í nevndir 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.01.2025 | 34/25 | 25/00163-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.02.2025 | 49/25 | 25/00163-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 30. januar 2025:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 27. februar 2025:** Tikið til eftirtektar.

# 50/25 Avrikssáttmáli við Visit Tórshavn 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 10.02.2025 | 6/25 | 25/00054-2 |
| 2 Býráðsfundur | 27.02.2025 | 50/25 | 25/00054-2 |

**Upprunin til málið**
Samstarvið millum Tórshavnar kommunu og Felagið Tórshavn

**Lýsing av málinum**
Tórshavnar kommuna og Visit Tórshavn dagføra leypandi samstarvið sínamillum.

Avrikssáttmálin skal samtykkjast av býráðnum og nevndini í Felagnum Tórshavn. Endamálið hjá Visit Tórshavn er at arbeiða ítøkiliga við ferðavinnu, marknaðarføring, branding av Tórshavn og menning av vinnuferðavinnu og at kunna um Tórshavn bæði innan- og uttanlands. Visit Tórshavn arbeiðir við útgangsstøði í teimum trimum súlunum í burðardyggari ferðavinnu, ið taka atlit til trivnað, umhvørvi og búskap.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Uppskot til avrikssáttmála er gjørt í samstarvi við leiðsluna í Felagnum Tórshavn.

Í avrikssáttmálanum fyri 2025 er millum annað ásett, at Visit Tórshavn skal arbeiða við at menna eina burðardygga og regenerativa ferðavinnu, skipa fyri førleikamennandi skeið, skelta til ferðafólk og at skipa kunningarstovuna í Nólsoy.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Avrikssáttmáli, j.nr. 25/00054-3

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/læṭtar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á Stjórnarskrivstovuni mæla til at taka undir við avrikssáttmálanum við Visit Tórshavn.

**Vinnunevndin 10. februar 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. februar 2025:** Einmælt samtykt.

# 51/25 Oyggjaleikir 2027 - Fígging

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 12.02.2025 | 28/25 | 25/02736-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 26.02.2025 | 21/25 | 25/02736-1 |
| 3 Býráðsfundur | 27.02.2025 | 51/25 | 25/02736-1 |
| 4 Býráðsfundur | | | 25/02736-1 |

**Upprunin til málið**
Oyggjaleikir koma til Føroyar í 2027 og fyrireikingaarbeiðið er so smátt farið í gongd. Sbrt. ÍSF verða fylgjandi ítróttargreinar í Tórshavnar kommunu:
Badminton, borðtennis, fótbóltur, frælsur ítróttur, judo, kurvabóltur, skjóting, súkkling, svimjing og tennis.

Hyggja vit yvirskipað eftir hvussu hesir ítróttafasilitetirnir eru fyri, so eru skjótibreytin og langhylurin nýggj. Í hinum endanum er Gundadalshøllin í ringum standi, og ábendingar eru um, at rennibreytin, sum er frá 2008, er slitin (Hetta skal kannast av "test-institutti"). Tveir tennisvøllir eru í Gundadali, men kravið er at tað skulu verða tríggir vøllir.
Flestu hallirnar klára at taka ímóti leikunum í dag. Hallirnar eru tó sera nógv brúktar og slit sæst á teimum. Tískil má nøktandi orka setast av til viðlíkahaldsarbeiði, so hallirnar eisini eru nossligar tá oyggjaleikirnir verða.

Havandi í huga at oyggjaleikirnir verða í Føroyum um 2 ár, so mælir umsitingin til, at uppraðfesta fyrireikingararbeiðið beinanvegin.
Fyri at kunna lúka tær treytir sum Oyggjaleikirnir 2027 krevja, metir umsitingin at tað er umráðandi, at seta upphædd av til tær íløgur, sum væntandi verða. Alt hetta krevur samstundis eitt ávíst samskipanararbeiðið, bæði við ÍSF, sersambond, fyrireikarar av oyggjaleikunum og TK. Harumframt mugu pengar setast av til ráðgeving í teimum førunum har brúk er fyri tí. Umsitingin metir, at til hetta krevst at seta 1 mió kr. av í 2025.

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|

| **Býráðsfundur**<br>27. februar 2025 | Blað nr.: 125 |
|---|---|
| | Formansins merki: |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

## Játtan:

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 5775 | | Frælsur ítróttur, Høll | 1312 | | | Oyggjaleikir 2027 | 1.000.000 kr. |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 1.000.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2025 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til:
- At uppraðfesta fyrireikingarabeiðið til Oyggjaleikirnar 2027
- At játtaðar verða kr. 1.000.000 av Kt 5775 (Frælsur ítróttur, Høll) yvir á kt 1312 Trivnaðarfyrisitingin.
- At málið verður beint í býráðið sum eykajáttan umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 12. februar 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir um fíggjarnevndina.

Annfinn Brekkstein var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 26. februar 2025:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið sum eykajáttanarmál, ið tørvar tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 27. februar 2025:** Heidi Lava Elgeirsdóttir legði fram broytingaruppskot við tilmæli um at taka undir við fíggjarnevndini við teirri broyting, at kr. 1.000.000,00 verða játtaðar av LK 57049 Oyggjaleikir 2027 yvir á kt 1312 Trivnaðarfyrisitingin.

Broytingaruppskotið varð einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

Uppskotið beint til aðru viðgerð.

# 52/25 Trivnaðarøkið við bátahylin í Álakeri

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 11.02.2025 | 5/25 | 25/02161-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 26.02.2025 | 30/25 | 25/02161-1 |
| 3 Býráðsfundur | 27.02.2025 | 52/25 | 25/02161-1 |

**Upprunin til málið**
Verkætlan um bátahavn í Álakeri.

**Lýsing av málinum**
Bátahavnin í Álakeri er í dag vorðið til eitt dragandi virki øki við ymsum maritimum virksemi og brúkarum. Umframt vanliga virksemi hjá útróðrarbátum og smábátum, er eisini ymiskt annað maritimt virksemi í økinum.
Tvey nýggj róðrarneyst hjá róðrarfeløgunum í Havn standa í gerð, og tey fara at savna bæði ung og eldri um kappróðrarítróttina. Kajakkfelagið er eisini virkið í økinum.
Teinæringurin Royður og 6 mannafarið Leiftur, ið verða nýttir í.s.v. undivísing í fólkaskúlum og til tilboð hjá serstovnum, hava eisini fingið fast pláss beint við dráttin.

Tað hevur leingi verið ynski um at fáa skipað eitt trivnaðarøki í.s.v. nýggju bátahavnina í Álakeri.
Í upprunaligu høvuðsverkætlanini fyri bátahavn í Álakeri var eitt øki avsett til trivnaðarøki, men økið datt burtur, tá ið róðrarneystini hjá róðrarfeløgunum vórðu staðsett á núverandi stað.
Soleiðis sum bátahavnin er skipað nú, verður mett at økið eystanfyri Bátatænastuna, við norðastu bátabrúnna, er best egnaða staðið til at skipa sum trivnaðarøki.

Eitt trivnaðarøki við einum felagshúsi kann geva møguleikar fyri ymsum virksemi, ið kann gagna økinum og trivnaðinum hjá borgarunum, og niðanfyri eru nøkur dømi:

Maritimur skúladepil
Fólkaskúlar og serstovnar, sum brúka bátarnar Royð og Leift í teirra undivísing og tilboðum, hava eftirlýst betri karmar til slíkt virksemi, t.d. høli at savnast í og pláss at goyma bjarginarvestar og aðra útgerð. Hetta kundi hóskandi verið í einum felagshúsi á ætlaða trivnaðarøkinum.

Undirhús
Tað er tørvur á einum nýggjum undirhúsi í Havn. Eitt undirhús hevði ligið væl í Álakeri, tí har savnast fólk longu í virkna maritima umhvørvinum. Undirhúsið kundi verið partur av einum felagshúsi á ætlaða trivnaðarøkinum.

Vælveruøki við "saunadypp" og heitum og køldum pottum
Kommunan og Tórshavnar havn hava fingið fleiri fyrispurningar um, hvar møguleikar eru fyri at hava baðstovur ("saunadypp") og heitar og kaldar pottar.
Í Hoyvík er tað ein avbjóðing at hava slíkt virksemi, tí tað vindur upp á seg við fleiri pottum og baðstovum, sum ger, at bátarnir, ið standa har, sleppa ikki út.
Í Álakeri er gott pláss til slíkt virksemi, og ætlaða trivnaðarøkið kann skipast soleiðis, at pláss verður til baðstovur og pottar við heitum og køldum reinsaðum vatni.
Tað, ið tey virkandi innan fyribrigdi "Saunadypp" eftirspyrja, eru hølir til skiftingarrúm, sum eisini kundi verðið partur av virkseminum í einum felagshúsi á trivnaðarøkinum.

Skipan av økinum
Fyri at trivnaðarøkið og serliga felagshúsið skal fáast at virka, er neyðugt at onkur dagliga hevur uppsýn við økinum og húsinum, og at ein kalendaraskipan til húsið fæst at virka.
Á viðlíkahaldsøkinum í Álakeri hevur Tórshavnar havn eitt fólk í arbeiði nakrar tímar um vikuna, fyri at halda skil á økinum. Hendan skipan hevur virkað sera væl. Hugsast kann, at ein líknandi skipan kann gerast fyri trivnaðarøkið.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Á íløguætlanini hjá Tórshavnar kommunu fyri 2025 eru avsettar 3,0 mió kr til trivnaðarøkið í Álakeri.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/léttar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Stjórin í Tórshavnar havn mælir til at játta 0,1 mió av deild 7476 "Smátahavnir" til fyrirreiking av verkætlan fyri trivnaðarøki í Álakeri og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Havnanevndin 11. februar 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 26. februar 2025:** Samtykt at taka undir við havnanevndini og beina málið í býráðið.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 27. februar 2025:** Einmælt samtykt.

# 53/25 Stormpullartar á molanum - 24/03385

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 11.02.2025 | 6/25 | 25/02723-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 26.02.2025 | 31/25 | 25/02723-1 |
| 3 Býráðsfundur | 27.02.2025 | 53/25 | 25/02723-1 |

**Upprunin til málið**
Bygging og umskian á molanum.

**Lýsing av málinum**
Víst verður til málslýsingar í málunum 21/02574 og 24/03385. Býráðið hevur hin 29/02-2024 játtað 1,0 mió og hin 20/06-2024 játtað 2,5 mió aftrat til gerð av nýggjum stormpullartum á molanum, t.v.s. í 3,5 mió.
Verkætlanin er nú liðug og kann lokast. Bókaða nýtslan er uml kr. 3.439.845.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
J.nr. 21/02574-23 : Samtykt býráðsfundur 29/02-2024
J.Nr. 24/03385-8 : Samtykt býráðsfundur 20/06-2024

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Stjórin í Tórshavnar havn mælir til at loka verætlanina P38PU; at avlopið á uml kr. 60.000 verður flutt yvir aftur á verkætlan P38 “Skipan av nýggja havnaøkinum”; og at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Havnanevndin 11. februar 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 26. februar 2025:** Samtykt at taka undir við havnanevndini og beina málið í býráðið.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 27. februar 2025:** Einmælt samtykt.

# 54/25 Bátahylur í Álakeri - 19/00083

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 11.02.2025 | 7/25 | 25/02724-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 26.02.2025 | 32/25 | 25/02724-2 |
| 3 Býráðsfundur | 27.02.2025 | 54/25 | 25/02724-2 |

**Upprunin til málið**
Verkætlan fyri nýggja bátahavn í Álakeri – mál nr 19/00083.

**Lýsing av málinum**
Verkætlanin nr L74010 "Bátahylur í Álakeri" er nú liðug, og kann lokast.
Játtanir og nýtsla sæst í talvuni niðanfyri:r:

| Fíggjarár | Játtan kr. | Nýtsla | Avlop |
|---|---|---|---|
| 2019 | 1.054.000 | 357.115 | |
| 2020 | 10.600.000 | 4.150.500 | |
| 2021 | 12.436.000 | 10.661.867 | |
| 2022 | 19.472.000 | 17.233.735 | |
| 2023 | 984.000 | 6.735.451 | |
| 2024 | | 5.369.401 | |
| Í alt | 44.546.000 | 44.508.069 | 37.931 |

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
19/00083 – Málslýsing.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**

Stjórin í Tórshavnar havn mælir til at loka verkætlan L74010 “Bátahylur í Álakeri”; at flyta avlopið á uml. 38 tkr. yvir á verkætlan L74018 “Bátahavn í Álakeri – Goymsluskúrar”; og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Havnanevndin 11. februar 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 26. februar 2025:** Samtykt at taka undir við havnanevndini og beina málið í býráðið.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 27. februar 2025:** Einmælt samtykt.

## 55/25 Útstykking oman fyri Argjahamar – øki 6.1

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.02.2025 | 24/25 | 25/01926-4 |
| 2 Fíggjarnevndin | 26.02.2025 | 23/25 | 25/01926-4 |
| 3 Býráðsfundur | 27.02.2025 | 55/25 | 25/01926-4 |

**Upprunin til málið**
Í mál nr. 22/07223, Útbjóðing av lendi á Argjum til bústaðar-, stovns- og vinnubygging, er samtykt at bjóða økir í útstykkingini oman fyri Argjahamar út til eitt nú bústaðarendamál.

**Lýsing av málinum**
Farið varð undir útstykkingina oman fyri Argjahamar fyri góðum tveimum árum síðani. Talan er um part av matrikkul nr. 256, har samlaða økið er skipað í bústaðarøkir, miðstaðarbygging og stovnsbygging.

Í heyst varð økið 6.1 boðið út til mennarar at bjóða uppá. Tilboðini skuldu vera kommununi í hendi í seinasta lagi 12. des 2024.

Økið 6.1 er tilsamans áleið 2.571 $m^2$, og varð økið boðið út til fastan mettan prís áljóðandi kr. 4.248.902, umframt matrikkulering. Hetta svarandi til kostprísin og allar útreiðslur, ið kommunan hevur havt av at menna og byggibúna økið.

Sí annars útbjóðingartilfarið, j.nr. 25/01926-1, Útbjóðingartilfar øki 6 1.

Tá freistin at lata tilboð inn var farin, hevði kommunan móttikið einans 1 tilboð frá tilboðsgevaranum sp/f Búsetur. Sí tilboð, j.nr. 25/01926-2, Uppskot Íbúðarbygging omanfyri Argjahamar, Tilboð og Søluprísir.

<u>Stutt lýsing av uppskotinum:</u>
Byggingin er skipað við eini lon við átta samanbygdum eindum í fýra hæddum. Byggingin er trekt nakað frá høvuðsvegnum, meðan parkeringin, ruskøki osfr. er út móti vegnum. Lítil tún- og býlingsgøta er millum byggingina og parkering/høvuðsvegin, har íbúgvar kunnu uppihalda sær og spæla. Skipað er eitt trivnaðarøki millum byggingina og høvuðsvegin og á suðursíðuni, og eitt øki niðan móti hagalendinum. Byggingin leggur seg í lendið, við einum lutvíst óplaneraðum bakgarði á suðursíðini, móti haganum. Á støðumyndini er víst, hvussu byggingin er skipað á matriklinum, í mun til bygging, parkering og atkomu til økið og byggingina.
Tilsamans eru 32 eindir í uppskotinum, og eru eindirnar millum 53 og 102 fermetrar til støddar. Allar íbúðirnar verða útgjørdar við hvør sínum goymslurúmi.

Búsetur hevur latið inn yvirlit yvir, hvat eindarkostnaðurin væntandi verður – sí skjal nr. 25/01926-2, Søluprísir. Fermetrakostnaðurin liggur millum kr. 37.500 - 42.000.

Í útbjóðingartilfarinum verður upplýst, at innlatnu tilboðini verða mett út frá niðanfyri standandi punkum, í fylgjandi raðfylgju:

- Endarkostnaður fyri hvørja búeind
- Byggilist
- Skipanin av økinum í sambandi við nærumhvørvið
- Væntað tíðarætlan fyri arbeiðstøku

**Upplýsingar frá umsitingini**
Umsitingin hevur spurt inn til upplýsta sølukostnaðin og víst á, at fyri kommununa er tað týdningarmikið at finna fram til ein sølukostnað, sum ger tað møguligt hjá borgarum, eisini láglønturn borgarum, at seta búgv.

Tilboðsgevi vísir á, at verkætlanin enn ikki er nóg búgvin til at lýsa ein neyvari eindarkostnað, men er tilboðsgevi sinnaður at hyggja nærri at hesum í eini víðari tilgongd.

Byggilistarliga verður mett, at uppskotið í stóran mun roynir at fyrihalda seg til kringumstøðurnar. Umsitingin hevur tó sett spurning fram til tilboðsgeva, um tað er møguligt at broyta ymisk viðurskifti, so sum hvussu bygningurin leggur seg í verandi lendi, og um hann kann rykkjast eitt sindur fyri at tykjast eitt sindur minni í vavi. Tilboðsgevi vil fegin kanna hesi viðurskifti nærri, tó er neyðugt at tryggja, at teir ikki arbeiða í blindum, og ynskja tilboðsgevi at vita, um kommunan er sinnað at selja teimum lendið, áðrenn farið verður undir at tekna meiri upp á bygningin.

Samanumtikið, so verður mett, at tilboðið frá p/f Búsetur er fullfíggjað, bæði í mun til innlatnað tilfarið, skipan, byggilist og væntaða endaliga úrslitið, og verður mett, at tað er ráðiligt at fara í eina tilgongd saman við tilboðsgeva, soleiðis at greiða fæst á øllum ivamálum, áðrenn økið verður selt tilboðsgeva.

Søla av íbúðareindunum:
Áhugamálini hjá Tórshavnar kommunu eru at nøkta bústaðartørvin í kommununi og harvið tryggja, at bústaðirnir koma borgarum, ið hava tørv á einum bústaði, til góðar.
Hetta kann tryggjast við, at kommunan ávísir ein keyparaskara til tilboðsveitara, t.d. við at áhugaði skriva seg upp á ein lista, har kommunan setir treytir til, hvør kann skriva seg upp, og at kommunan eftirfylgjandi lutar íbúðareindirnar út millum tey áhugaðu.
Ein annar møguleiki er, at tilboðsveitarin stendur fyri allari sølu, og tá er truplari hjá kommununi at tryggja, at tað eru tey, sum veruliga hava ein bústaðartørv, sum sleppa framat at keypa. Tað økir um vandan fyri spekulatión.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Fyri økið er serstøk byggisamtykt oman fyri Argjahamar galdandi. Økið 6.1 er undir øki D í serstøku byggisamtyktini, sum ásetur:
*1. Økið verður lagt til íbúðarbygging.*
*2. Byggingin skal verða sett samsvarandi einari góðkendari heildarætlan fyri økispartin.**
*3. Mest loyvda byggistig er 0,4.*
*4. Mest loyvda nýtslustig er 1,6.*
*5. Byggjast kunnu í mesta lagi 4 hæddir og byggingin skal hava mønutekju, sum er javnfjarð við vegin.*
*6. Mest loyvda hædd er 12,5 m til hægsta punkt við útvegg og 14 m til mønuna, mált frá planeringshædd.*
*7. Fyri at tryggja nøktandi ljósviðurskifti og fjølbroytni í byggingini, skulu bygningseindir vera sundurbrotnar við atkomu til fríøki og haga. Fasadan skal hava eitt spæl við innvikum og øðrum.*
*8. Aðrar ásetingar viðvíkjandi bygging skulu vera í samsvar við almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu.*

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
22/07223, Útbjóðing av lendi á Argjum til bústaðar-, stovns- og vinnubygging

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
25/01926-1, Útbjóðingartilfar øki 6.1
25/01926-2, Uppskot Íbúðarbygging omanfyri Argjahamar
25/01926-2, Søluprísir

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>27. februar 2025 | Blað nr.: 134<br>Formansins merki: |

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | x | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | x | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

## Játtan:

Vanlig játtan ☒

Eykajáttan ☐

Loka verkætlan ☐

| Játtast av: Deild | Játtast av: Verk-ætlan | Játtast av: Navn | Játtast á: Deild | Játtast á: Verk-ætlan | Játtast á: Navn | Játtast á: Nýggj verkætlan | Upphædd |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | 6475 | L64019 | Útstykking oman fyri Argjahamar | | 4.248.902 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 4.248.902 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2025 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

Hetta málið er partur av útstykkingarverkætlanini oman fyri Argjahamar. Søluupphæddin skal flytast á L64019, Útstykking oman fyri Argjahamar.

**Tilmæli:**
Kommunustjorin, leiðarin á Stjórnarskrivstovuni og býararkitekturin mæla til:
- at selja og sundurbýta økið 6.1 til tilboðsgevara, sp/f Búsetur, tá endaligu samráðingarnar við tilboðsgevara eru komnar á mál.
- at Tórshavnar kommuna stendur fyri at savna ein keyparaskara og lutar íbúðareindirnar út millum hesi og harvið tryggjar tilboðsveitaranum ein nøktandi keyparaskara.
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. februar 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Í løtuni hevur kommunan bert reglugerð fyri útlutan av grundøkjum til sethús. Tá ið kommunan stendur fyri at savna ein keyparaskara og eisini lutar íbúðareindirnar, verður mett tørvur á reglugerð at skipa hetta. Ætlanin er at leggja uppskot fyri politisku skipanina um hetta.

**Fíggjarnevndin 26. februar 2025:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og at orða reglugerð og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. februar 2025:** Einmælt samtykt.

## 56/25 Víðkan av kirkjugarðinum í Kollafirði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.02.2025 | 25/25 | 25/02390-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 26.02.2025 | 24/25 | 25/02390-2 |
| 3 Býráðsfundur | 27.02.2025 | 56/25 | 25/02390-2 |

**Upprunin til málið**
Kirkjugarðurin í Kollafirði er um at verða fullur – einans uml 40 tøk pláss eru eftir í garðinum, og tískil er neyðugt at fara undir at víðka um garðin, soleiðis at garðurin verður framtíðartryggjaður nøkur áratíggju afturat.

**Lýsing av málinum**
Kirkjugarðurin var upprunaliga gjørdur í 1980, og síðani varð hann útbygdur í 1995 og aftur í 2010.

Í dag eru 236 gravir brúktar í kirkjugarðinum, umframt at um 50 gravir eru umbidnar. Einans 40 gravir eru tøkar í kirkjugarðinum, og tískil er tað av alstórum týdningi, at kirkjugarðurin verður víðkaður sum skjótast.

Talið av jarðarferðum í Kollafirði liggur árliga á umleið 8. Harafturat skal vísast á, at makar vanliga fáa grøv setta av ella umbidna samstundis, og tískil verða umleið 16 gravir upptiknar hvørt ár.
Hetta hevur við sær, at innan 2-3 ár, so eru eingi tøk pláss eftir í kirkjugarðinum.

Mælt verður til, at víðkanin verður innan fyri verandi kirkjugarð, og at arbeiðið somuleiðis kemur at fevna um gøtugerð, ljósseting og annað, sum verður mett at eiga at verða raðfest fyri at fáa kirkjugarðin at virka á fullgóðan hátt.

Arbeiðið at víðka kirkjugarðin krevur, at farið verður undir eina tilgongd at prosjektera víðkanina, og at arbeiðið eftirfylgjandi verður boðið út í arbeiðstøku.

Tá arbeiðið at víðka kirkjugarðin er liðugt, so skal lendið liggja í 1-2 ár, áðrenn fólk kunna verða jarðað í garðinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í byggisamtyktini sum D1 øki lagt til almenning, náttúrufriðingar og mentunarlig endamál.

Allir kirkjugarðar í kommununi eru staðsettir í D1 øki.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Heitt er á tveir ráðgevarar um at geva tilboð upp á prosjekteringina. Ætlanin er at fara undir prosjekteringina so skjótt málið er samtykt og fígging er sett av til at seta arbeiðið í gongd.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
-

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6575 | LK65007 | Kirkjugarðar í Kollafirði | 6575 | x | Víðkan av kirkjugarði í Kollafirði | x | 1.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | ókent |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | Summar 2025 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 500.000 |

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og býararkitekturin mæla til:
- at farið verður undir at víðka kirkjugarðin í Kollafirði,
- at játtaðar verða kr. 1.000.000 av LK65007 á nýggja verkætlan við heitinum Víðkan av kirkjugarði í Kollafirði
- at heimila umsitingini at seta prosjekteringina í gongd og eftirfylgjandi at bjóða arbeiðstøkuna út, og at seta arbeiðið í gongd,
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. februar 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Kostnaðurin fyri at projektera víðkanina av kirkjugarðinum kemur at liggja millum kr. 200.000-250.000. Neyðugt er tí í fyrstu atløgu einans á játtan til projekteringina, og verður komið aftur í nevnd tá kostnaðurin fyri útbyggingina er kendur.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- at farið verður undir at víðka kirkjugarðin í Kollafirði,
- at játtaðar verða kr. 250.000 av LK65007 á nýggja verkætlan við heitinum Víðkan av kirkjugarði í Kollafirði,
- at heimila umsitingini at seta prosjekteringina í gongd og eftirfylgjandi at bjóða arbeiðstøkuna út,

- tá kostnaðurin fyri útbyggingina er kendur, at málið verður lagt fyri nevnd aftur at játta írestandi fíggingina av útbyggingini,
- at beina málið í býráðið

**Fíggjarnevndin 26. februar 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum til fíggjarnevndarfundin 26. februar 2025 og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. februar 2025:** Einmælt samtykt.

## 57/25 Útstykking til sethús við Stórutjørn - 22/02943

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.02.2025 | 32/25 | 25/00581-2 |
| 2 Tekniska nevnd | 10.02.2025 | 6/25 | 25/00581-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 26.02.2025 | 25/25 | 25/00581-2 |
| 4 Býráðsfundur | 27.02.2025 | 57/25 | 25/00581-2 |
| 5 Býráðsfundur | | | 25/00581-2 |

**Upprunin til málið**
Málið er framhald av málinum 22/02943 Útstykking til sethús við Stórutjørn

**Lýsing av málinum**
Viðgerðin av málinum higartil er lýst í málslýsingini fyri mál nr. 22/02943.
Í stuttum snýr málið seg um, at politiskt var ynski at seta gongd á bústaðarbyggingina við Stórutjørn.

Meðan arbeitt varð við at gera klárt til at bjóða arbeiðið at gera útstykking á økinum út, gav P/F Articon kommununi eitt tilboð upp á at útstykkja býlingarnar 1 og 4 úr heildarætlanini. Tilboðið var skipað sum heildararbeiðstøka, har kommunan innan fyri rammurnar av tilboðnum kundi gera tillagingar. Sáttmáli varð gjørdur áljóðandi kr. 79.320.642,13, íroknað mvg við afturbering til kommununa.

<u>Spillvatnsoptión</u>
Henda útstykkingin er so statt sambært samtykt sett í verk sum heildarverkætlan við P/F Articon sum heildarveitara. Afturat tilboðnum hevur P/F Articon givið eina optión upp á at stoypa reinsiverk og leggja kloakkering millum útstykkingarnar við Stórutjørn til reinsiverkið og millum reinsiverkið og útlát út á sjógv eystan fyri Sandvíkar. Kostnaðurin fyri hesa optión er kr. 7.078.911,56 íroknað mvg við afturbering.

Henda optiónin kann síggjast sum verkætlan fyri seg, tí at reinsiverk og kloakkering skal eisini gerast og bindast í høllina við Tjarnir, vinnuútstykkingina á Ovara Hjalla, umframt framtíðar útstykkingar við Stórutjørn (býlingur 2, 3, 5 og 6), soleiðis at økið verður virkið við nøktandi leiðingum. Sáttmáli varð ikki gjørdur um hesa optión í fyrstu atløgu.

Nú høllin við Tjarnir er um at verða liðug og vinnuútstykkingin á Ovara Hjalla verður liðug í summar, gerst tað alt meiri átroðkandi at fáa eina spillvatnsloysn til hesar útbyggingarnar, og tað er somuleiðis av hesi grund, at neyðugt er at taka støðu til spillvatnsætlanina fyri samlaða økið. Somuleiðis er neyðugt at fáa eina spillvatnloysn til útstykkingina við Stórutjørn, sum ikki kann leiðast í verandi spillvatnsloysnir í økinum, vegna ov smáar dimensiónir á leiðingunum og longu staðfestar avbjóðingar við verandi nýtslu.

Mett verður, at Tórshavnar kommuna eigur at fara undir at aktivera optiónina fyri spillvatnsloysnina fyri at tryggja, at høllin við Tjarnir og vinnustykkini á Ovara Hjalla kunnu takast í nýtslu, beinanvegin, sum tey eru liðug.

<u>Byggiharraútreiðslur og óvæntað</u>
Í upprunamálinum er einans játtaður peningur fyri sáttmálan við P/F Articon um heildararbeiðstøku. Nú arbeiðið er farið í gongd er tørvur á, at peningur eisini verður játtaður til byggiharraútreiðslur í sambandi við verkætlanararbeiðið. Her er talan um viðurskifti, so sum verkætlanarleiðsla, uttanhýsis eftirlit, óvæntaðar útreiðslur o.l. Mett verður, at 5% av sáttmálaupphæddini eiga at verða játtaðar til óvæntaðar útreiðslur og 2,5% til verkætlanarleiðslu og uttanhýsis eftirlit. Tilsamans 7,5% ella kr. 6.480.000,-.

Keyp av lendi:
Tórshavnar kommuna hevur fingið tilsøgn frá Búnaðarstovuni at keypa lendi til víddar 74.000 m² til útstykkingina í býlingi 1 og 4, sí tilsøgn og kortskjal j.nr. 25/00581-3. Keypspeningurin áljóðandi kr. 8.424.500,00 skal játtast sum útlegg av verkætlanini.

Játtanaryvirlit
Í talvuni niðanfyri kann síggjast yvirlit yvir verandi játtan, og játtanirnar, sum biðið verður um afturat.

| Dato | Játtan | Upphædd |
|---|---|---|
| 20.06.2024 | Sáttmáli við P/F Articon um heildararbeiðstøku v. komm. mvg | 79.320.642,13 |
| - | Optión um spillvatnsleiðing v. komm. mvg. | 7.078.911,56 |
| - | Byggiharraútreiðslur og óvæntað 7% | 6.480.000,00 |
| - | Keyp av lendi | 8.424.500,00 |
| | **Tilsamans** | **101.304.053,69** |

Framhaldandi tilgongdin:
Fram til í dag hevur verið arbeitt við býlingi 1 og 4, sum í heildarætlanini verða nevnd oyggj 1 og oyggj 4.

Í málinum, Skipan av Stórutjørn (mál nr. 18/03468), varð samtykt á býráðsfundi 28.09.2023, at heildarætlanin fyri Stórutjørn skuldi nýtast sum vegleiðandi amboð fyri víðari menningina av økinum.

Arbeitt verður framhaldandi við at skipa býlingarnar niður í smálutir, soleiðis at tilgongdin verður gjørd rætt og gott.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Almenna byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu er galdandi fyri økið, og skal serstøk byggisamtykt gerast, tá prosjekteringin er liðug.

**Upplýsingar frá umsitingini**
-

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Mál nr. 18/03468 Skipan av Stórutjøn er yvirskipaða málið fyri økið. 28. apríl 2022 var málið seinast fyri býráðið, har tað varð endaliga samtykt, at:
- Játta fígging til keyp av lendinum til Innkomuvegin og komandi vinnuútstykkingina Ovari hjalli.
- at heimila umsitingini at gera avtalu við Búnaðarstovuna um at keypa lendi í stigum til framtíðar útstykkingar burtur av matr. nr. 1æf og 139ed. So hvørt, sum tørvur er á fígging, verður málið lagt fyri aftur avvarðandi nevndir til støðutakan.
- at heimila umsitingini at samráðast við og gera avtalu við festaran um avlopstilfar og um at framtíðartryggja møguleikarnar at reka landbúnaðarvirksemi á festinum. Avtalan verður at leggja fyri aftur og góðkenna av avvarðandi nevndum.

Mál nr. 22/02943 Útstykking til sethús við Stórutjørn (arkiverað upprunamál)

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
J.nr. 22/02943-4 VS: Útstykking við stórutjørn – sjálvboðið tilboð

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

## Játtan:

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☒
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| | | | 6475 | L64021 | Útstykking við Stórutjørn, B1, B4 | | 21.983.411,56 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 101.304.053,69 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2024/2026 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 500.000 |

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, leiðarin á Stjórnarskrivstovuni, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at heimila umsitingini at:

- gera sáttmála við arbeiðstakara um loysn fyri spillvatn frá Stórutjørn við støði í optiónini áljóðandi kr. 7.079.000,-, sum verður fíggjað sum útlegg á verkætlan L64021 Útstykking við Stórutjørn, B1, B4, kt, 6475 Byggibúning bústaðir.
- at játtað verða 7,5% av arbeiðstøkusáttmálanum svarandi til kr. 6.480.000,- til byggiharraútreiðslur í sambandi við verkætlanarleiðslu, uttanhýsis eftirlit, óvæntaðar útreiðslur og líknandi í sambandi við heildararbeiðstøkuna,-, sum verður fíggjað sum útlegg á verkætlan L64021 Útstykking við Stórutjørn, B1, B4, kt, 6475 Byggibúning bústaðir.
- at játtaðar verða kr. 8.424.500,- til útreiðslur í sambandi við keyp av lendi til verkætlanina.
- at málið verður beint í býráðið til tvær viðgerðir umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. februar 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, men at arbeiðið við at gera kloakkina frá reinsiverkinum og út á sjógv skal bjóðast út.

**Tekniska nevnd 10. februar 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**

Við hesi umbøn um eykajáttan verður biðið um at hækka upprunaliga útleggið í jnr. 22/02943 á kr. 79.320.642,13 við kr. 21.983.411,56, soleiðis at samlaða útleggið til útstykkingina við Stórutjørn verður 101.304.053,69.

**Fíggjarnevndin 26. februar 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála, tekur undir við byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd við teirri broyting, at arbeiðið at gera kloakk og reinsiverk verður boðið út. Játtaðar verða kr. 6.480.000,00 til byggiharraútreiðslur og óvæntað 7% og kr. 8.424.500,00 til keyp av lendi sum eykajáttan, ið tørvar tvær viðgerðir í býráðnum.

Høgni Vilhelmsen og Tróndur Sigurðsson atkvøða blankt.

**Býráðsfundur 27. februar 2025:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við fyrstu viðgerð við 11 atkvøðum fyri, ongari atkvøðu ímót og tveimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Guttormur í Skála, Annfinn Brekkstein, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen.

Blankt atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen

Uppskotið beint víðari til aðru viðgerð.

# 58/25 Orkuátøk á Lágargarði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 10.02.2025 | 11/25 | 25/02841-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 26.02.2025 | 29/25 | 25/02841-1 |
| 3 Býráðsfundur | 27.02.2025 | 58/25 | 25/02841-1 |

**Ískoyti**
Vísandi til mál 17/03154 Orkupolitikkur

Umsitingin hevur bjóðað út og fingið tilboð inn. Tilboðið umfatar 3 stk. ventilatiónsannlegg við nýggjum ventilatiónsrørum til tær 3 lonirnar. Hetta fer at betra góðskuna av inniluftini og endurvinna avkastluftina betur og harvið minka um orkutørvin.

Kostnaðarmeting á 3.500.000 kr er gjørd út frá innkomnu tilboðum. Vit fingu játtað 2.000.000 kr í 2024 fyri at byrja verkætlana, hettar er tó ov lítið til hesa verkætlan, so tað restar 1.500.000 kr.

**Skjøl**
17/03154-1 Orkupolitikkur
17/03154-42 VS: Lágargarður - upprit um orkuátøk og umvælingar
25/02841-3 Ventilatiónsskipan
25/02841-3 DA-Denmark-Exhausto-VEX150-horisontal-udforelse-VEX150H

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| 6177 | LK61705 | Orkupolitikkur | 6177 | L61712 | Orkuátøk á Lágargarði | | 1.500.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>27. februar 2025 | Blað nr.: 144<br>Formansins merki: |

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, leiðarin á umhvørvisdeildini og leiðarin á bygningsdeildini mæla til at flyta kr. 1.500.000 av konto 6177 Umsiting og røkt av bygningum, løgukarmi Orkuátøk, LK61705, Orkupolitikkur, til verkætlanina L61712 Orkuátøk á Lágargarði, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 10. februar 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Á fundinum í Náttúru- og umhvørvisnevndini 10. februar 2025, varð spurt eftir hvat slar av anleggum ætlanin er at brúka og hvat virkningsgradurin er.

Talan er um 3 nýggj anlegg. Tey nýggju anleggini hava ein virkningsgrad á 86%, í mun til tey gomlu, sum høvdu 60%.

Útrokning vísir, at vi kontinuerligari drift er sparingin uml. 40% í mun til verandi skipan; hetta svarar til uml. Kr. 45.000,- pr. anlegg pr. ár.

**Viðheft** eru 2 nýggj skjøl til kunningar, tað er j.nr. 25/02841-3:
- Ventilatiónsskipan
- DA-Denmark-Exhausto-VEX150-horisontal-udforelse-VEX150H

**Fíggjarnevndin 26. februar 2025:** Samtykt at taka undir við náttúru- og umhvørvisnevndini við teirri broyting, at kr. 500.000 verða játtaðar av konto 6177 Umsiting og røkt av bygningum, løgukarmi Orkuátøk LK61705, og kr. 1.000.000 játtaðar av løgukarmi LK27016, Ellisheim, dagføring og játta á verkætlanina L61712 Orkuátøk á Lágargarði. Málið beint í býráðið.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 27. februar 2025:** Tróndur Sigurðsson legði fram broytingaruppskot um at játta kr. kr. 1.500.000 av konto 6177 Umsiting og røkt av bygningum, løgukarmi Orkuátøk, LK61705, Orkupolitikkur, til verkætlanina L61712 Orkuátøk á Lágargarði.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið fall við fimm atkvøðum fyri, átta atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu:

Fyri atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen og Guttormur í Skála.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri, fimm atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Guttormur í Skála

Ímóti atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen.

# 59/25 Broyting av almennu byggisamtyktini fyri part av matr. nr 13a, Norðradalur - frá 4. grundumráði til F alment frítíðarøki

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.02.2025 | 27/25 | 25/00801-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.02.2025 | 59/25 | 25/00801-1 |

**Upprunin til málið**
Á vári 2024 varð almenna byggisamtyktin fyri matr. nr 13b og part av matr. nr 13a, Norðradalur (á Ytru Fløtum) broytt frá A1-bústaðarøki til 4. grundumráði (landbúnaðarøki). Broytingin varð framd, eftir at eigari/festari av matr. nr 13a bygdi nýtt fjós í økinum, og kravdi Búnaðargrunnurin, at økið varð broytt til 4. grundumráði, sum er ætlað Landbúnaði. Somuleiðis metti umsitingin ikki, táverandi galdandi ásetingar (A1-bústaðarøki) at vera hóskandi í mun til nýtsluna, sum er Landbúnaður.

Tá uppskotið lá til almenna hoyring, mótmæltu eigarar av matr. nr 13b, sum er eitt grundøkið á Ytru Fløtum, á 518m$^2$. Orsøkin fyri mótmælið varð, at eigarar høvdu ætlanir um møguliga at byggja hús í økinum í framtíðini, og letur hetta seg ikki gera, eftir at økið er broytt til 4. grundumráði. Kommunan móttók broytingaruppskot frá eigarum, har nýtt A1-økið var staðsett longur suðuri, og gekk kommunan ikki mótmælinum/broytingaruppskotinum á møti, grundað á, at umsitingin ikki metir tað ráðiligt, at A1 øki, Bústaðarøki, verður staðsett miðskeiðis í haganum. Mælt verður til, at nýggj sethús verða bygd við A1 økið inni í gomlu bygdini í Norðradali, har økispartur eisini er settur av til frítíðarhús.

Hetta málið hevur sín uppruna, eftir at eigarar av matr. nr 13b á fundi við umsitingina gjørdu vart við, at ynskið ikki er at byggja heilársbústað, men at varðveita møguleika at byggja frítíðarhús ella “haldhús” í økinum. Eigararnir vísa á, at ætlanin alla tíðina hevur verið, at byggja eini “haldhús” ella frítíðarhús á økinum, soleiðis at tá tey hjálpa til á festinum, so hava tey eitt stað at vera í.

**Lýsing av málinum**
Hetta uppskotið snýr seg um at broyta býarskipanina frá 4. grundumráði til eina økisáseting, sum loyvir bygging av húsi. 4. grundumráði loyvir ikki bygging av vanligum sethúsum, og tískil er torført at finna eina rætta áseting til teirra ætlanir, sum upprunaliga lótu seg gera í økispartinum A1, sum matr. nr. 13b upprunaliga var.

Mælt verður so statt til at broyta eitt øki á somu stødd til øki F-frítíðarøki. Mett verður, at tað í hesum økinum ikki er til stórvegis ampa fyri landbúnaðarvirksemið á Ytru Fløtum. Á henda hátt varðveita eigarar av matr. nr 13b møguleika at byggja frítíðarhús, treytað av at matrikul 13b verður ummatrikuleraður (fluttur) til staðsetingina av nýggja F-økinum, sambært uppskotinum (sí kort Eftir broyting.).

**Lógir, ásetingar o.a.**
**Ásetingar fyri 4. grundumráði í almennu byggisamtyktini eru:**
1. 4. grundumráði verður lagt til landbúnað og alment frílendi og tílíkt.
2. Loyvt verður einans at byggja fjós, úthús og annað, sum hevur við vanligt traða- og jarðarbrúk at gera.

> a) Loyvt er at umvæla verandi sethús og byggja somikið afturat teimum, at tey eru hóskilig til nútímans nýtslu sum sethús.
> b) Á jarðarstykkjum omanfyri 5.000 m2 er í mesta lagi loyvt at byggja 60 m2 í gólvvídd harav kunnu verða eini frítíðarhús í sjálvstøðugum bygningi, ið er í mesta lagi 30 m2 gólvvídd.
> c) Á jarðarstykkjum undir 5.000 m2 er í mesta lagi loyvt at byggja 30 m2 gólvvídd, sum eisini kann vera frítíðarhús.
> d) Loyvt er at gera byggingar, sum neyðugar eru fyri alment gagnligar veitingar.
> e) Onnur bygging og virksemi, sum ikki hóskar seg at liggja í bygdum øki, kann staðsetast í 4. Grundumráði.

f) Øll bygging í 4. Grundumráði sambært § 26, stk 2, litra d og e, skal gerast sambært serstakari byggisamtykt

3. Hús og onnur bygging skulu vera soleiðis vorðin og sett soleiðis í landslagið, at tey lýta sum minst.

4. Í sambandi við bygging í 4. grundumráði treytar kommunan sær rætt at seta krøv til skap og staðseting.

**Ásetingar fyri F í almennu byggisamtyktini eru:**
1. Umráðisparturin verður lagdur til frítíðar- og summarhús og frítíðarøkir.

2. Útstykking og bygging verður einans loyvd sambært serstakari byggisamtykt fyri eitt natúrligt avmarkað øki.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Yvirskipað metir umsitingin ikki, at tað er rætt býarskipanarliga at staðseta bústaðir miðskeiðis í haganum, í hesum førinum á Ytru Fløtum. Og umsitingin ásannar eisini, at tað ikki er býarskipanarliga skynsamt at broyta byggisamtyktina fyri einans ein matrikkul.

Hóast hetta, so verður mælt til at broyta byggisamtyktina, grundað á umstøðurnar, sum í stóran mun snúgva seg um at fáa loyvi at byggja eini hús, sum skulu stuðla undir landbúnaðarvirksemi, og grundað á søguna, har økið upprunaliga var lagt út til bústaðarøki.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- 23/03807 Broyting av almennu byggisamtyktini frá A1 til 4. Grundumráði fyri part av matr. nr. 13a, Norðradalur

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
- *Áðrenn broyting*, journal nr. 25/00801-2
- *Eftir broyting*, journal nr. 25/00801-2

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og býararkitekturin mæla til at broyta byggisamtyktina fyri matr. nr. 13b frá 4. grundumráði til øki F, sambært kortskjali Eftir broyting, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. februar 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 27. februar 2025:** Einmælt samtykt.

# 60/25 Fyrispurningur um broyting av byggisamtykt, galdandi fyri matr. nr. 50ø, Velbastaður

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.02.2025 | 21/25 | 25/00818-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.02.2025 | 60/25 | 25/00818-1 |

**Upprunin til málið**
30. oktober 2024 móttók kommunan fyrispurning, vegna stýrið fyri Fanskúlan í Havn, um at broyta byggisamtyktina fyri matr. nr 50ø, Velbastaður. Hetta er í samband við sølu av ognini undir Borgarhálsi 44, har Fanskúlin í Velbastað hevur hildið til síðani 2007.

**Lýsing av málinum**
Bygningurin á matr. nr 50ø varð í 2007 innrættaður til virksemi hjá Fanskúlanum. 21. oktober 2024 varð samtykt at niðurleggja hetta virksemið og at selja ognina. Bygningurin var frammanundan nýttur sum barnagarður, og hevur byggisamtykt fyri økispart E: Almennir stovnar, verið galdandi fyri ognina í hesum tíðarskeiðinum.

Skúlin liggur í einum bústaðarøki við einans sethúsum, og er ynskið frá stýrinum at fáa byggisamtyktina broytta til B Sethús, soleiðis at sølan kann gerast bæði lættari og skjótari.

Sambært viðtøkunum hjá sjálvsognarstovninum skal møgulig ogn hjá stovninum, í sambandi við avgerðina um at taka stovnin av, fara til listarlig ella onnur vælgerandi endamál fyri børn í Tórshavnar Kommunu.

Stovnurin hevur tískil ikki fíggjarlig áhugamál í at fáa byggisamtyktina broytta, uttan at tað stuðlar undir eina skjóta sølu og tryggjar, at virðið frá søluni fer til endamál, ið gagna børnum í Tórshavnar Kommunu.

Býarskipanarliga er tað upplagt at matr. nr. 50Ø, eins og grannaognirnar, verður lagt undir økispart B: Sethús, og tískil mælir umsitingin til at broyta byggisamtyktina fyri matr. nr 50ø frá E til økispart B: Sethús. Ásetingin fyri B er galdandi fyri grannahúsini, og er somuleiðis í tráð við dámin í økinum. Harafturat skapar hetta treytir, soleiðis at nýtslan í húsunum meira lættliga kann tillaga seg eftir skiftandi umstøðum.

Ásetingar fyri øki B gera, at ognin í framtíðini kann nýtast sum bústaður, umframt at ognin kann innrættast sum handil, til vinnuendamál ella stovn, treytað av at virksemið ikki er til ampa ella lýtir dámin á økinum sum sethúsabýling.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022

**Ásetingar fyri øki E í byggisamtyktini fyri Velbastað: Almennir stovnar**
**1.** Øki verður lagt av til almennar stovnar, til undirvísing, heilsurøkt, mentanarlig og átrúnaðarlig endamál o.t.
**2.** Innan fyri økispartarnar mugu bara verða gjørd slík virki ella hús, ið samsvara við endamálið hjá avvarðandi økispørtum og tænastuvirksemi, ið hava samband við tey.
**3.** Nettonýtingarstigið má ikki fara upp um 0,3.
**4.** Hús kunnu bara verða bygd eftir eini byggiætlan, sum bygdaráðið hevur góðkent fyri eitt náttúrligt avmarkað øki.

**Ásetingar fyri øki B í byggisamtyktini fyri Velbastað: Sethús**

**1.** Loyvt er einans at byggja sethús við upp til 2 íbúðum og – eftir serloyvi frá byggivaldinum – tvíhús, rað- og ketuhús o.t. til eitt húski. Í sambandi við bústaðirnar skal tó bera til at innrætta høli til handlar, onnur vinnuendamál og stovnar, treytað av at hesi virki ikki eru til ampa ella lýta dámin á økinum sum sethúsabýlingi.
**2.** Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 400 $m^2$ til støddar. Tá ið byggingin verður framd eftir byggiskipan, sum bygdaráðið hevur góðkent og tryggjað ella eftir serstakari byggisamtykt, kann bygdaráðið loyva, at grundstykkini eru minni enn 400 $m^2$, tó í minsta lagi 320 $m^2$ fyri sethús (einhúskishús) og 260 $m^2$ fyri hvønn partin av einum tvíhúsum, ketu- ella raðhúsum. Ein partur av teirri ásettu minstuvídd kann verða lagdur burturav sum felags tilhalds- og bilstøðlaøki.
**3.** Nettonýtingarsstigið má ikki fara upp um 0,3 fyri einhúskishús og 0,4 fyri tvíhús, ketu- ella raðhús.
**4**. Hús mugu einans verða bygd í einari hædd við nýttum lofti og mugu ikki vera hægri enn 5 m til yvirgrind og 8,0 m til mønuna, mált frá meðaljørðildi (miðal við húsahornini). Kjallaraloftið má ikki vera meira enn 1,0 m oman fyri hægsta jørðildi við húsahorn. Er hæddarmunurin á lendinum, roknað sum munurin millum hægsta og lægsta jørðildi, minni enn 1,5 m er tó loyvt at leggja kjallaraloftið upp til 2,5 m oman fyri lægsta jørðildi við húsahorn. Bert ein kjallari má vera. Har bygging er fram við vegi kunnu vegmyndugleikarnir áseta hæddina á kjallaraloftinum í mun til veghæddina.
**5.** Í serstakari byggisamtykt er ikki loyvt at fara upp um tey nýtingarstig, ið nevnd eru í stk. 3, tá økið verður roknað sum heild.
**6**. Loyvt verður at umvæla verandi sethús og byggja aftur at teimum, t.d. durur, baðirúm o.t., so tey eru hóskilig til nútímans nýtslu sum sethús.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Fyrispurningur um broyting av byggisamtykt, galdandi fyri matr. nr. 50ø, Velbastaður, journal nr 24/08611

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
*50ø, Velbastaður - Áðrenn broyting*, journal nr 25/00818-2
*50ø, Velbastaður - Eftir broyting,* journal nr 25/00818-2

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og býararkitekturin mæla til at broyta byggisamtyktina fyri matr. nr. 50ø, Velbastaður, sambært skjalinum 50ø, Velbastaður - Eftir broyting, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. februar 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 27. februar 2025:** Atkvøtt varð um tilmælið frá byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri, ongari atkvøðu ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Guttormur í Skála, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen.

Blankt atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

# 61/25 Broyting av almennu byggisamtyktini fyri part av matr. nr. 139a, Hoyvík - Vinnuøkið á Ovara Hjalla,

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.02.2025 | 28/25 | 25/00863-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.02.2025 | 61/25 | 25/00863-1 |

**Upprunin til málið**
Arbeitt hevur í eina tíð verið við at skipa eina nýggja vinnuútstykking á Ovara Hjalla. Lendisarbeiðið er í gongd og serstøk byggisamtykt, sum lýsir eina skipan av økinum, kom í gildi í 2024 (sí skjal *Áteknað Serstøk byggisamtykt fyri vinnuøkið á Ovara Hjalla*). Sambært ætlanini eru vinnugrundstykkini rættiliga ymisk til støddar, og gevur hetta rúm fyri fjølbroyttum vinnuvirksemi.

**Lýsing av málinum**
Tá byggisamtyktin av fyrstan tíð var broytt, var prosjekteringin av vinnuútstykkingini ikki liðug, og tískil liggur økið partvíst sum B4 vinnuøki og 4. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Hetta málið snýr seg um at tillaga býarskipanina, soleiðis at B4 vinnuøkið fylgir markinum fyri serstøku byggisamtyktini fyri vinnuøkið á Ovara Hjalla, og at broyta tann partin av økinum, har ætlanin er at at hava smærru vinnugrundstykkir til B7, sum er byggisamtyktaráseting, ið loyvir vinnugrundstykkjum millum 200-500$m^2$.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Ásetingar fyri B4 øki í almennu byggisamtyktini:**
1. Umráðisparturin verður lagdur til vinnuvirki, verksmiðjur og tílíkt og til tænastuvirksemi, ið hevur samband við hesi.
2. Virkini skulu kunna flokkast í umhvørvisflokkunum 2 til 4 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.
3. Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 2000 $m^2$.
4. Útstykking verur einans loyvd sambært útstykkingarætlan fyri eitt natúrligt avmarkað øki.
5. Byggistigið skal ikki fara upp um 0,5.
6. Rúmmál á húsunum skal ikki fara upp um 3 $m^3$ fyri hvønn $m^2$ av grundstykkinum.
7. Hús skulu ikki vera hægri enn 12 m.

**Ásetingar fyri umráðispart B7 í almennu byggisamtyktini:**
1. Umráðisparturin verður lagdur til smærri vinnuvirki.
2. Virkini skulu kunna flokkast í umhvørvisflokkunum 2 til 4 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.
3. Grundstykkini skulu vera í minsa lagi 200 $m_2$ og í mesta lagi 500 $m_2$.
4. Útstykking verður einans loyvd sambært útstykkingarætlan fyri eitt natúrliga avmarkað øki.
5. Byggistigið skal ikki fara upp um 0,5.
6. Nýtslustigið skal ikki fara upp um 1,0.
7. Hús skulu ikki vera hægri enn 9 m.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tá ið serstaka byggisamtyktin varð samtykt, var ætlanin at oyramerkja øki á tilsamans 9704$m^2$ til smærri vinnugrundstykkir, og er markið í serstøku byggisamtyktini (øki B) teknað hareftir. Síðani tá er ætlanin broytt, og viðmælir umsitingin at seta av umleið 14.556$m^2$ til B7 øki (smá vinnugrundstykkir). Á hesum økinum verður pláss fyri áleið 24 vinnugrundstykkir millum 200-500$m^{2,}$ sambært skipanaruppskotinum (sí skjal *Smærri vinnustykkir á ovara hjalla_skipanaruppskot_samlað*).

Um uppskotið verður góðkent, verður neyðugt at rætta markið í serstøku byggisamtyktini, soleiðis at tað fylgir B7 økinum, sambært skjalinum *Kort – Eftir broyting.*

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- *Nýggj serstøk byggisamtykt fyri vinnuøkið á Ovara Hjalla, matr. nr. 139a, Hoyvík,* journal nr. 23/04694

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
- *Kort - Áðrenn broyting,* journal nr. 25/00863-2
- *Kort - Eftir broyting*, journal nr. 25/00863-2
- *Smærri vinnustykkir á ovara hjalla_skipanaruppskot_samlað, journal nr. 25/0863-3*
- *Áteknað Serstøk byggisamtykt fyri vinnuøkið á Ovara Hjalla, journal nr 23/04694*

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís øki í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/léttar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og býararkitekturin mæla til at broyta byggisamtyktina fyri part av matr. nr. 39a, sambært kortskjali *Kort-Eftir broyting,* og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. februar 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 27. februar 2025:** Einmælt samtykt.

# 62/25 Elbilafelagið: Umsókn um broyting í byggisamtyktum til frama fyri orkuskifti

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.02.2025 | 29/25 | 25/01103-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.02.2025 | 62/25 | 25/01103-1 |

**Samanumtøka av málinum**
Málið byrjaði í oktober 2021, tá ið Elbilafelagið sendi áheitan til kommunur, um at broyta byggisamtyktir, soleiðis at tað verður krav um at seta løðistøðir, ella gera klárt til uppsetan av løðistøðum til elbilar, tá bygt verður. Umsitingin gjørdi eitt uppskot um broyting av almennu byggisamtyktini, sum í mai 2024 varð samtykt í býráðnum. Av tí at feilur stóð skrivaður í málslýsingini og í kunngerðini, kundi Umhvørvismálaráðið ikki góðkenna broytingaruppskotið (sí skjalið *Málslýsing 21-04379, upprunaliga málið*), og lýsir hetta málið tað rættaða broytingaruppskotið til almennu byggisamtyktina.

**Lýsing av málinum**
Seinastu árini hevur sølan av elbilum verið vaksandi, og 31 desember 2024 vóru umleið 8,7% av øllum skrásettum persónbilum í Føroyum elbilar. Fyri elbilaeigarar í íbúðarbygningum kann tað vera trupult at at fáa atgongd til løðistøðir, um tað ikki er møguligt at knýta eina tílíka beinleiðis í íbúðina. Tískil heitti Elbilafelagið á Tórshavnar kommunu um at seta krav í sambandi við, at íbúðarbygningar verða bygdir, so hesir hava eina ávísa nøgd av løðistøðum, og at parkeringsøkini eru gjørd klár til uppsetan av løðistøðum í framtíðini.

SEV viðmerkti málið 18. apríl 2024, og er av tí áskoðan, at tað er skilagott at seta krøv til fyrireiking til løðing av elbilum, serliga í mun til íbúðarbygging.

Síðani skrivið frá Elbilafelagnum er almenna byggisamtyktin endurskoðað, og á heysti 2023 kom áseting í gildi fyri parkeringspláss til minst 10 bilar, sum krevur minst eina løðistøð umframt innleggingar til minst 20% av øllum p-plássum, soleiðis at møguligt er at seta løðistøðir upp.

Upprunaligi fyrispurningurin frá Elbilafelagnum vísti til donsku ásetingarnar frá 2020, sum ger mun á íbúðarbygging og bygningum, sum ikki eru til íbúðir, og er kravið, at bygging og umbygging av íbúðarbygningum krevur innlegging til øll parkeringsplássini, tá talan er um bygningar við fleiri enn 10 parkeringsplássum.

Umsitingin hevur við íblástri frá donsku ásetingunum gjørd uppskotið niðanfyri, og viðmælir at leggja hesa orðingina inn í almennu byggisamtyktina undir Kap 3 § 3 øki til bilstøðil:

| Slag av bygningi og bygging | Krav |
|---|---|
| Nýggjur íbúðarbygningur við fleiri enn 10 parkeringsplássum | Fyrireiking av innleggingum til øll parkeringsplássini |
| Nýggjur bygningur, sum ikki er íbúðarbygningur, við fleiri enn 10 parkeringsplássum | Uppsetan av minst einari løðistøð og innlegging til minst 20% av parkeringsplássunum |
| Størri umbygging av íbúðarbygningi við fleiri enn 10 parkeringsplássum | Innlegging til øll umvældu parkeringsplássini |
| Størri umbygging av bygningi, sum ikki er íbúðarbygningur, við fleiri enn 10 parkeringsplássum | Uppsetan av minst einari løðistøð og innlegging til minst 20% av umvældu parkeringsplássunum |

**Lógir, ásetingar o.a.**
KAP III § 3. Øki til bilstøðil
1. Í 1. og 2. grundumráði skal bera til at seta aðrar treytir til parkering, um

so er at ikki ber til at útvega øll tey ásettu parkeringsplássini.
2. Í 3. grundumráði skal í minsta lagi vera 2,5 pláss pr. hús, harav 0,5 á felags parkeringsøki.
3. Á parkeringsplássum til minst 10 bilar: a) Skal setast upp minst 1 løðistøð til el bilar. b) Innleggingar skulu leggjast til minst 20% av øllum parkeringsplássunum, soleiðis at møguligt er at seta løðistøðir til el bilar upp.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

- 21/04379 Umsókn um broyting av almennu byggisamtyktini - krav um løðistøðir til elbilar

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

- Málslýsing 21-04379, upprunaliga málið, journal nr 25/01103-2
- *Uppskot rættað – Almenna byggisamtyktin við frámerktum broytingum,* journal nr. 25/01103-3

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og býararkitekturin mæla til at broyta § 3, stk 3, sum eru ásetingar um krøv um innleggingar til løðistøðir, í almennu byggisamtyktini, samsvarandi skjalinum *Uppskot rættað – Almenna byggisamtyktin við frámerktum broytingum*, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. februar 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 27. februar 2025:** Einmælt samtykt.

# 63/25 Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.02.2025 | 30/25 | 25/01104-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.02.2025 | 63/25 | 25/01104-1 |

**Samanumtøka av málinum**
Hetta málið er eitt framhald av málinum Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað (21/03382), sí skjalið *Upprunaliga málið – Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað*.

Í 2020 varð samtykt at endurskoða byggisamtyktirnar fyri allar bygdirnar í kommununi (20/04243). Upprunaliga var ætlanin at endurskoða tær galdandi serstøku byggisamtyktirnar, sum í fleiri førum ikki hava verið endurskoðaðar síðani kommunusamanlegging.

Endamálið er at broyta ásetingar, soleiðis at tær bæði samsvara betri millum bygdirnar í kommununi (javnseta bygdirnar) og við almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu, harafturat verður í ávísum førum viðmælt at tillaga byggisamtyktarmørk. Á hendan hátt er tað bæði lættari at skilja og umsita byggisamtyktirnar fyri bygdirnar í kommununi.

Fyrsta uppskotið um at endurskoða serstøku byggisamtyktina fyri Velbastað varð samtykt 28. oktober 2021 og lá til almenna hoyring  millum 1. nov. 2021 til 13. des. 2021. Kommunan móttók 3 mótmælir og mælti umsitingin frá at ganga teimum á møti.

Málið varð samtykt og síðani sent landsmyndugleika til góðkenningar. Í skrivi frá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum, dagfest 27. september 2022, verður heitt á kommununa, at bygdirnar í Tórshavnar kommunu framyvir vera reguleraðar í almennu byggisamtyktini, ella við hvør sínari almennari byggisamtykt. Umsitingin hevur síðani gjørt uppskot um almenna byggisamtykt fyri Velbastað, sí skjal *Almenna byggisamtyktin – Velbastaður, rættað*.

**Lýsing av málinum**
Uppskotið varð samtykt í byggi- og býarskipanarvendini 12 februar í 2024, men varð av misgáum ikki lagt aftur fyri Velbastaðnevndini fyrr enn í desember 2024. Umsitingin sendi tilfarið umvegis teldupost og Velbastaðnevndin hevði hesar viðmerkingar:

**Viðmerkingar frá velbastaðarnevndini:**

*Málið hevur verið fyri hjá okkum fyrr, og kunnu vit vísa til tær viðmerkingar sum eru gjørdar tá. Eisini hava vit hesar viðmerkingar at leggja afturat:*

1) *Vit ynskja at hetta málið verður viðgjørt eins og málið í Kirkjubø. Málið á Velbastað er sent til staðbundnu nevndina, meðan í Kirkjubø er sent til almenna hoyring.*
2) *Rættast hevði verið við einari almennari kunning í báðum bygdunum.*
3) *Í nýggju byggisamtyktini hevur man broytt økið F (Almenn fríøki) til D2 (Almennir stovnar og mentan). At taka fríøki úr samtyktini ger, at tú hevur møguleika at byggja á hesum økjum, og sostatt eru ongi almenn fríøki á Velbastað. Hesum mótmæla vit.*
4) *Í fleiri av ásetingunum verður orðingin «og tílíkt» nýtt, og meta vit at hetta er óheppið, tá tað hetta kann boyggjast og vendast, alt eftir hvørji áhugamálini eru.*

Umsitingin svaraði Velbastaðnevndini 16. desember 2024.

> *Til 1 og 2:*
> *Málið verður eftir ætlan lagt fyri býráðið í januar 2025, og fer síðani, eins og endurskoðanin av Kirkjubø, út til almenna hoyring í minst 6 vikur. Í hoyringstíðarskeiðnum*

*er ætlanin at umsitingin leggur uppskotið fram, og borgarar fáa høvið at spyrja inn til og viðmerkja málið, á kunnandi borgarafundi í Velbastað.*

*Til 3:*
*Hesa viðmerking ynskja vit at fáa lýsta nærri, tí sambært viðmerkingini verður øki F í verandi byggisamtykt lagt til almenn fríøki, meðan verandi byggisamtykt lýsir F sum alment frítíðarøki (ítróttarvøllir, spæliplass útiverupláss o.t.).*
*Sambært uppskotinum kemur D2 ístaðin fyri bæði E (almennir stovnar) og F (almenn frítíðarøki), og metir umsitingin at D2 (almennir stovnar og mentan) rúmar bæði endamál.*

*Til 4:*
*Orðingin "og tílíkt" er afturvendandi fyri allar almennu byggisamtyktirnar í Tórshavnar kommunu, umframt galdandi byggisamtykt fyri Velbstað og Kirkjubø. Endamálið er at avmarkað talið av økispørtum og at varðveita ein ávísan fleksibilitet í umsitingini, sum kann vera ein fyrimunur bæði í samband við byggimálsviðger og fyri menning av bygdini. Tað er tó lætt at ímynda sær at orðingin verður brúkt til at fevna um nýtslu, sum ikki hóskar, og verður viðmerkingin tikin til eftirtektar.*

Umsitingin mælir til at leggja uppskotið, sum lýst í hesum málinum fyri býráðið og síðani til almenna hoyring.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022

**Upplýsingar frá umsitingini**
Í málinum 25/00818, verður mælt til at broyta byggisamtyktina fyri matr. nr. 50ø, Velbastaður, frá E (almennir stovnar) til B (sethús) sambært galdandi serstøku byggisamtykt. Hetta er í sambandi við at frískúlin niðurleggur virksemið, og ynskið er at selja ognina.

Sambært uppskotinum um endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað, verður matr. 50ø broyttur frá E øki til D2 økið (almennir stovnar), og tískil kemur hetta ikki at samsvara við tilmælið í máli 25/00818, um broytingin til sethús verður góðkend.

Umsitingin mælir til, at atlit verður tikið til mál nr 25/00818, soleiðis at tilfarið sum verður sent til endaliga viðgerð, annaðhvørt lýsir matr. nr 50ø sum A bústaðarøki ella sum E almennir stovnar, treytað av endaligu viðgerðini av máli nr 25/00818.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- *Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað,* journal nr. 21/03382
- *Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar,* journal nr. 20/04243
- *Fyrispurningur um broyting av byggisamtykt, galdandi fyri matr. nr. 50ø, Velbastaður - 24/08611,* journal nr. 25/00818

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
- *Almenna byggisamtyktin – Velbastaður, rættað,* journal nr. 25/01104-2.
- *Kort – áðrenn broyting,* journal nr. 25/01104-2
- *Kort – eftir broyting,* journal nr. 25/01104-2.
- *Velbastað – áðrenn og eftir– Tekstur,* journal nr. 25/01104-2.
- *Upprunaliga málið – Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað,* journal nr. 25/01104-4

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja uppskotið til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað sambært skjølunum *Almenna byggisamtyktin – Velbastaður, rættað* og *Kort – eftir broyting*, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. februar 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 27. februar 2025:** Atkvøtt varð um uppskot frá Tróndi Sigurðsson um at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina.

Uppskotið varð einmælt samtykt.

| | Býráðsfundur<br>27. februar 2025 | Blað nr.: 159 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

# 64/25 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 26.02.2025 | 38/25 | 25/00161-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.02.2025 | 64/25 | 25/00161-1 |

**Upprunin til málið**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 26. februar 2025:** Framlagt.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 27. februar 2025:** Framlagt og góðkent.

# 65/25 Umsókn um prinsipielt byggiloyvi til nýggja kirkju á matr. nr. 115, við Støðlagøtu á Argjum - 20/03903

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 27.02.2025 | 65/25 | 25/00436-14 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl** 20/03903 Umsókn um prinsipielt byggiloyvi til nýggja kirkju á matr. nr. 115, við Støðlagøtu á Argjum

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Ískoyti:**
Tróndur Sigurðsson biður um at fáa málið á skrá til komandi býráðsfund í februar til umrøðu og støðutakan.

**Býráðsfundur 27. februar 2025:** Málið umrøtt.

# 66/25 Broytingar í viðtøkunum fyri SEV - 24/03799

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.01.2025 | 47/25 | 25/00285-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.02.2025 | 66/25 | 25/00285-1 |

**Upprunin til málið**
Ein bólkur við fimm borgarstjórum og nevndarformanninum í SEV hava arbeitt við framtíðar bygnaðinum í SEV.

**Lýsing av málinum**
Hetta er gjørt við støði í einum ynski um at knýta felagið tættari at eigaranum og at fáa eina dygga serfrøði inn í nevndina, sum saman við eigarunum kann seta røttu kósina fyri felagið.

Bólkurin hevur viðgjørt fleiri møguleikar og eisini fingið sær uttanhýsis ráðgeving.
Bólkurin er fyribils komin fram til hesar niðurstøður viðvíkjandi bygnaði og vali av nevnd.

**Nevndin:**
• Farið verður frá verandi máta at velja nevnd.

• Sambandið til eigararnar verður styrkt við tað, at tað verða borgarstjórarnir í Tórshavnar kommunu og størstu kommununum í sýslunum, sum sita í nevndini. Hesi verða 7 í tali. Berst hesum frá at møta, verða tað ávikavist varaborgarstjórin í Tórshavnar kommunu og borgarstjórin í næststørstu kommununi í sýsluni, sum møta.

• Somuleiðis verða 1-3 serfrøðingur/-ar valdir í nevndina. Fyri at stuðla undir professionaliseringina av nevndini verða forfólk og næstforfólk vald millum serfrøðingarnar.

• Borgarstjórarnir verða samsýndir við vanligum fundarpeningi (ongin føst samsýning), meðan serlig samsýningarskipan verður fyri serfrøðingarnar.

Bólkurin metir harumframt, at ein fyrsta uppgáva hjá nýggju nevndini verður at seta út í kortið fyri felagið. Ein partur av hesum eigur at vera at gera uppskot til dagførdar viðtøkur fyri felagið, sum hóska til tað, sum SEV er og skal vera framyvir.

Við støði í hesum heitir bólkurin á borgarstjórarnar at umhugsa ein leiðslubygnað, sum yvirskipað verður broyttur sum nevnt omanfyri.

Ætlanin er at umrøða málið á borgarstjórafundi í august. Tá er eisini ætlanin, at endaliga uppskotið til viðtøkubroytingar fyriliggur, sum vónandi kann leggjast fyri ein eyka aðalfund í SEV í september mánaði.

Býráðið fær við hesum høvi at viðmerkja uppskotið til víðari viðgerð.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir til at umrøða málið um broytingar í leiðslubygnaðinum i SEV.

**Býráðsfundur 03. juli 2024:** Málið umrøtt.

**Ískoyti:**
Borgarstjórin ynskir býráðið at umrøða uppskotið til viðtøkubroytingar í SEV sum grundarlag fyri, at uppskotið verður lagt fyri aðalfund í SEV.

**Býráðsfundur fyri læstum hurðum 30. januar 2025:** Málið umrøtt.

**Ískoyti:**
Kári Johansen biður um at fáa málið á skrá til fyrst komandi almennan býráðsfund til atkvøðugreiðslu.

Í stuttum leggur uppskotið upp til hesar broytingar:

- **Politiska umboðanin:** Uttanfyri TK verður farið frá verandi siðvenju við at velja kommunustýrislimir sum nevndarlimir. Tey seks økini uttanfyri TK skulu framyvir velja ein borgarstjóra í økinum. Í TK skal borgarstjórin ella ein kommunustýrislimur frameftir veljast í nevndina. Eigaraumboðanin í nevndini verður tískil 6 borgarstjórar og 1 umboð frá TK, sum kann vera borgarstjóri ella vanligur kommunustýrislimur.

- **Serfrøðingarnir – val:** Í minsta lagi 2 og í mesta lagi 3 serfrøðingar skulu veljast í nevndina. Tilnevningartilgongdin verður skipað av Kommunufelagnum, sum fær til uppgávu at gera tilmæli um, hvørjir serfrøðingarnir skulu vera. Borgarstjórafundurin í Kommunufelagnum tilnevnir síðani serfrøðingarnar.

- **Serfrøðingarnir – førleikar:** Krøv verða í viðtøkunum sett til fakligu og verkligu førleikarnar hjá serfrøðingunum. Tilnevningin er tí ikki frí, men bundin av nøkrum kørmum í viðtøkunum. Starvstíðin hjá serfrøðingunum verður í útgangsstøðinum avmarkað til tvey skeið, men kann verða longri, um kvalifiseraður meiriluti er fyri hesum.

- **Samsýningar:** Kommunufelagið ger tilmæli um samsýning til nevndina innanfyri viðtøkuásettar karmar. Fyri økisvaldu umboðini skal mann halda seg til reglur og venjur innan tað almenna. Serfrøðingarnir verða hinvegin samsýntir eftir øðrum og meiri marknaðargrundaðum leisti.

- **Formansskapur:** Ein borgarstjóri/kommunustýrislimur verður formaður í SEV, og ein serfrøðingur verður næstformaður. Nevndin skipar seg annars sjálv eins og í dag.

- **Forskotin starvstíð:** Starvstíðin hjá nevndini verður forskotin. Politikararnir fylgja 4-ára kommunuvalskeiðinum, og serfrøðingarnir sita 4 ár rundan um eitt kommunuvalskeið.

- **Talgilt samskifti:** Nevndin fær heimild at áseta felagsins reglur um talgilt samskifti. Endamálið er millum annað at loyva fult talgildum samskifti so hvørt sum tað verður mett neyðugt ella hóskandi. Til dømis kann nevndin gera av, at aðalfundarinnkallingar einans verða sendar limakommununum í talgildum líki. Mett verður, at heimildin eigur at vera breið og smidlig, soleiðis at viðtøkurnar ikki eru til hindurs fyri, at felagið kann fylgja talgildu menningini í samfelagnum.

- **Fylgibroytingar av broyttari nevndarstødd:** Talið av nevndarlimum verður økt úr 7 upp í eina skiftandi stødd upp á 9-10. Hetta skeiklar javnvágina í nøkrum av verandi ásetingum um, hvussu nógvir nevndarlimir skulu vera til staðar ella taka undir við ávísum viðurskiftum.
  Tað snýr seg ítøkiliga um, hvussu nógvir nevndarlimir kunnu krevja aðalfund (§ 3, stk. 8), nær nevndin er viðtøkufør á fundi (§ 4, stk. 7), og hvussu nógvir nevndarlimir kunnu krevja nevndarmál lagt fyri aðalfundin (§ 4, stk. 8).
  Roynt er so vítt gjørligt at varðveita somu javnvág, sum er í galdandi viðtøkum, tó at tað er trupult at gera fult út, tá ið farið verður yvir til nevnd við broytiligari stødd.

Uppskotsstillararnir mæla somuleiðis til, at sami aðalfundur áleggur nývaldu nevndini innan 2 ár at koma við uppskoti til nýggjar viðtøkur fyri felagið. Freistin er ásett, soleiðis at nevndin fyrstu tíðina fær stundir at hugsavna seg um kjarnuvirksemið hjá felagnum og gera sær tær royndir, sum eru neyðugar til tess at orða uppskot til nýggjar viðtøkur.

**Býráðsfundur 27. februar 2025:** Eftir áheitan frá Elsu Berg varð atkvøtt um fyriliggjandi uppskot til broytingar í viðtøkunum fyri SEV. Uppskotið varð samtykt við tígjgu atkvøðum fyri, einari atkvøðu ímóti og tveimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Annfinn Brekkstein, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen.

Ímóti atkvøddu: Kári Johansen.

Blankt atkvøddu: Bergur Robert Dam Jensen og Tróndur Sigurðsson.

**FUNDURIN LOKIN KL. 20:45**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Elsa Berg | Heðin Mortensen | Heidi Lava Elgeirsdóttir |
| Annita á Fríðriksmørk | Anja Weyhe | Kristianna Winther Poulsen |
| Bergur Robert Dam Jensen | Guttormur í Skála | Annfinn Brekkstein |
| Tróndur Sigurðsson | Kári Johansen | Høgni Vilhelmsen |
| | Birgir Nielsen | |